# Ársaðalfundur

hjá P/F Smyril Line

Boðað verður við hesum til ársaðalfund í P/F Smyril Line (reg. nr. 544)

**hósdagin 21. mars 2024 kl. 15:00**

at verða á Hotel Hafnia, Áarvegur 4-10, 100 Tórshavn, við hesi dagsskrá:

0. Val av fundarstjóra.
1. Frásøgn frá virki felagsins í farna ári.
2. Framløga av grannskoðaðum roknskapi og fíggjarstøðu til góðkenningar.
3. Uppskot frá nevndini um, hvussu ársavlopið skal verða nýtt ella um rindan av halli sambært góðkenda roknskapin.
4. Val av nevndarlimum.
5. Val av grannskoðara.
6. Ymiskt

- - 0 - - -

Rætturin hjá einstøku partaeigarum felagsins til at luttaka á aðalfundi og at greiða atkvøðu í sambandi við partabrøv síni verður ásettur í mun til tey partabrøv, sum viðkomandi partaeigarar eiga skrásetingardagin. Skrásetingardagurin er 1 vika, áðrenn aðalfundurin verður hildin, ið er **hósdagin 14. mars 2024.**

Til samtyktar av uppskoti um viðtøkubroyting krevst smb. § 106, stk. 1 í vinnufelagslógini, at í minsta lagi 2/3 av bæði greiddum atkvøðunum og av tí partinum av felagskapitalinum, sum er umboðaður á aðalfundinum, hava tikið undir við uppskotinum.

Til at greiða atkvøðu á aðalfundinum krevst, at partaeigarin í seinasta lagi **mánadagin 18. mars 2024** hevur fráboðað luttøku síni á aðalfundinum og hevur prógvað sín atkvøðurætt á skrivstovu felagsins Yviri við Strond 1, 100 Tórshavn.

**6. mars 2024**

**P/F Smyril Line**

**NEVNDIN**